# Fleiri ferðafólk til Íslands

Talið á fremmandum ferðafólki, sum vitja Ísland, er vaksið nógv tey seinnu árini. Tøl hjá hagstovuni í Reykjavík vísa, at í árunum frá 2000 til 2008 vaks talið úr 300.000 í 485.000 ella heili 60 prosent. Össur Skarphéðinsson, ráðharri í ferðavinnumálum, sigur við Morgunblaðið, at búskaparstøðan í Íslandi fær væntandi tær avleiðingar, at fleiri útlendingar fara til Íslands, meðan færri íslendingar fara av landinum. Hann vísir samstundis á, at stjórnin hevur gjørt av at brúka 100 milliónir íslendskar krónur til at menna ferðavinnuna.



# Fyrireikað til kreppu

Í Daqnmark hava nógvar fyritøkur koyrt fólk til hús, síðani fíggjarkreppan fór at gera vart við seg, men sambært einari kanning fara tær flestu fyritøkurnar at klára kreppuna, og nógvar verða uppaftur betur fyri, tá kreppan eina ferð hasar av. Kanningin, sum tann stóra grannskoðara- og ráðgevingarfyritøkan Ernst & Young hevur gjørt saman við Økonomisk Ugebrev, vísir, at 75 prosent av fyritøkunum siga seg vera fyrireikaðar ella væl fyrireikaðar til kreppuna, og 57 prosent svara, at kreppan fer at styrkja tær, so tær verða enn betur fyri, tá hon endar.

**Sverrir Bjørnsson**
**eigur lýsingarstovuna Tað Hvíta Húsið – www. hvitahusid.is**



*Grønland, Ísland, Føroyar og Norra sum ein arbeiðsmarknaður við felags gjaldoyra. Tað eru ynskini hjá Sverrir Bjørnsson, lýsingarstjóra í Reykjavík*

**At skipa Ísland, Grønland, Norra og Føroyar, sum ein marknað og eitt fíggjarøki, var eitt av hugskotunum, sum kom fram á verkstovuni "Reinventing the Vest Nodic as a brand", ið varð fyriskipað farna sunnudag. Hugskotið kom frá Sverrir Bjørnsson, lýsingarstjóra**

# Allur Útnorður sum ein marknaður

**SNIÐSTEVNA**
*Leif Láadal*

**Reykjavík:** Í Reykjavík er ein maður, sum eitur Sverrir Bjørnsson. Hann er ikki heilt ókendur, og heldur ikki heilt ósmæðin. Seinastu tíðina hevur tosað hart og týðiliga fyri at gera allan útnorður til ein og sama marknað við felags gjaldoyra, og hesir tankar síggja út til at verða væl móttiknir í Íslandi. Sverrir er eins og nógvir aðrir íslendingar við at vera rættiliga troyttur av at verða stýrdur av ódugnaligum íslendskum bankafólkum. Hann vil tí hava eitt breiðari lívsgrundarlag – bæði reint mentalt, men eisini landafrøðiliga.

## Marknaður – marknaðarføring

Sverrir Bjørnsson, sum er stjóri og eigari av íslendsku lýsingarfyritøkuni "Tað hvíta húsið", veit hvat hann tosar um, tá tað snýr seg um marknaðarføring. Og tað, sum hann tosaði um á verkstovuni snúði seg eisini fyrst og fremst um marknaðarføring, men í hesum sambandi kom hann eisini inn á sjálvan marknaðin. Marknaðin, har marknaðarføringin kemur frá, um mann so kann siga.

Og hesin marknaður er sum er, alt ov lítil, heldur Sverrir. Stendur tað til hann, so leggja Grønland, Ísland, Føroyar og Norra bara saman í ein arbeiðsmarknað við felags gjaldoyra. Økið, sum hesi lond hava ræðið á, er risastórt og ovurhonds ríkt upp á bæði náttúruríkidømi og menniskjaligt tilfeingi. Hendan blanding er so sterk, at sjálvt ES ikki kann standa seg í kappingini, heldur hann.

## Internetið

Og tá tað snýr seg um sniðgeving, sum var evnið á verkstovuni, so mælir Sverrir til, at Internetið verður brúkt nógv meira enn nú. Netið er ein bíligur og góður máti at gera vart við seg, men tað er lætt at blíva burtur á netinum, tí tað kann vera torført røkka út til kundarnar. Flestu sniðgevar í Útnorði hava fínar og flottar heimasíður, men fá vita um tær. Tí mælir hann til samstarv millum sniðgevar, almennar myndugleikar, sum kunnu stuðla fíggjarliga, og so fólk, sum duga at marknaðarføra. Eitt slag av portali fyri skapandi fólk í økinum, sum skal røkka langt út um økið – út í alla verðina. Eina verð, sum í flestu førum als ikki veit, at vit eru til, minnir hann á.

## Politikkur

Sverrir Bjørnsson hevur tosað við íslendingar – bæði teir sum hann hevur hitt á síni leið og í íslendskum fjølmiðlum – um hendan útnorðurmarknað við felags gjaldoyra, og nógv taka undir við honum. Ikki tey, sum vilja hava Ísland upp í ES her og nú, men tey flestu av hinum. Eisini hevur hann tosað við fólk í Norra um tankar sínar, so nú manglar bara Grønland og Føroyar, sigur hann.

– Eg havi góðar vónir um at hetta kundi eydnast, tí tey bæði størri londini Norra og Ísland eru jalig, og tá er altíð lættari at fara víðari við tankunum, sigur hann.

Nú er tíðin búgvin til at hesir tankar koma upp á eitt politiskt stig, og Sverrir vónar tí, at onkur politikari – eisini onkur føroyskur politikari – fer víðari við hugskotinum.

# – Komið úr hugnakrókinum

**-Tað er torført, fyri ikki at siga ógjørligt at koma nakran veg, um tú ikki tekur ein kjans. Tað segði ein av høvuðsrøðarunum á verkstovuni, sum Samvit og NORA skipaðu fyri í Reykjavík farna sunnudag, Heini Zachariassen, íverksetari**

**SNIÐSTEVNA**
*Leif Láadal*

Reykjavík: Tá tú ert ein av hundrað, og ætlar tær at kappast við hini 99, so er rættiliga torført at gera seg galdandi, um tú bara roynir at gerast betri enn tey til tað, sum tey gera.

Eitt dømi kundi verið hondbóltur. Um tú skalt gerast ein góður hondbóltsspælari, so kappast tú í veruleikanum ímóti øllum hondbóltsspælarunum í øllum heiminum. Tað eru enntá nógvir hondbóltsspælarar í Føroyum, og tí er sjálvt tann kappingin beinhørð. Velur tú hinvegin at gera okkurt heilt annað – okkurt bæði øðrvísi og kanska eisini vandamiklari, so er kappingin als ikki so hørð.

– Tað eru ikki meira enn eini fýra-fimm av hundrað, sum tora at taka kjansir, so tá er kappingin hørð upp á sín máta, men slett ikki so hørð, sum innan t.d. hondbóltin, fortelur Heini Zachariassen.

## Tora

Og Heini Zachariassen veit hvat hann tosar um. Hann var við til at stovna fyritøkuna Bullguard, sum skuldi kappast við risastórar fyritøkur, sum t.d. Microsoft á teldutøknimarknaðinum. Og tað gekk (og gongur) sera væl. Hesar og aðrar royndir á arbeiðsmarknaðinum, hava givið honum eitt fundament, sum hann heldur enn gjarna vil siga øðrum íverksetarum fra, og tað fingu so sniðgevar og onnur at vita eitt sindur um í Íslandi.

Framløgan hjá Heina spenti víða, men samanumtikið má sigast, at lyklaorðið var at "tora". Tú skalt tora at hugsa øðrvísi, tora at trúgva upp á teg sjálva(n), tora at leggja hugskot tíni fram, tora at fara til banka ella íleggjarar og selja vøruna, tora at fara út um landoddarnar og tora at hugsa uttanfyri kassan.

– Hetta er ikki vandamikið. Hetta er ikki nakað mann doyr av. Tað kann vera, at onkur missir eitt sindur av pengum upp á eina verkætlan, men so verða teir vunnir inn aftur upp á onkra aðra. So tað er bara at fara í gongd, sigur Heini Zachariassen, íverksetari.




*Ein íverksetari – tað verið seg sniðgevi ella onnur – skal tora at taka kjansir. Ger víðkomandi ikki tað, er vónleyst at gera seg galdandi, sigur Heini Zachariassen, íverksetari*